# ESG FRÁSAGNAR LEIÐBEINING

Fyri fyritøkur við virksemi í Føroyum




**BURÐARDYGT** VINNULÍV 2022

# FOR**ORÐ**

Burðardygt vinnulív hevur samstarvað við Januar fyri at gera hesa sjálvbodnu fráboðanarleiðbeining fyri føroyskar fyritøkur. Høvuðsendamálið fyri leiðbeiningina er at stuðla fyritøkum, tá tær seta kósina eftir at loysa trupulleikar við at skapa virðir.

Føroyar eru í einari broytingartíð til at verða grønari, her hava tær føroysku fyritøkurnar ein møguleika at gera sín leiklut galdandi, bæði í Føroyum og í altjóða høpi. Vit vóna, at við meira gjøgnumskygni fyri ESG (á føroyskum: umhvørvið, sosialt og leiðsla) trupulleikum, so sum veðurlagsbroytingar, hevði hetta verið eitt gott høvi til at áminna og økja ferðina á møguligum loysnum.

**Johannes Jensen**, nevndarformaður hjá Burðardygt Vinnulív

---

ESG rapportering er ein effektivur háttur fyri fyritøkur og stovnar at samskifta og svara upp á eitt økjandi tal av spurningum frá áhugabólkum um teirra ávirkan á samfelagið.

At skapa eina tílíka frágreiðing kann vera avbjóðandi, tá hetta má nøkta tørvin hjá ymsum áhugabólkum, og samstundis fylgja eini mannagongd, ið tryggjar samskiftið av viðkomandi indikatorum. Sum hjá-høvundur av hesi leiðbeiningini, roynir Januar at verða við til at skapa eina tílíka mannagongd og eyðmerkja markatøl, sum fyritøkur og stovnar, ið eru virkin í Føroyum, kunnu nýta til teirra samskifti.

ESG rapportering eigur at vera latin við somu trygd, sum óheftir partar lata til fíggjarligar roknskapir, og á tann hátt tryggja lesarum álit og neyvleika viðvíkjandi rapport-eringini. Hetta verður alsamt meira viðkomandi, nú altjóða lóggáva viðvíkjandi rapportering kemur í nýtslu á altjóða kapitalmarknaðum.

**Hans Laksá**, statsaut. revisor og stjóri hjá P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki
**Óli Joensen**, statsaut. revisor hjá P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

---

Føroyar útflyta í dag til fleiri altjóða marknaðir. Tað er avgerandi týdningur fyri kappingarførið, at vit betra um dátur, sum hava áhuga fyri kundarnar. Vit síggja longu nú nýggja ES-lóggávu um burðardygd, sum fer at ávirka virðisketurnar. Yvirhøvur síggja vit ein vaksandi áhuga fyri hesum í ymisku londunum, og vit mugu verða til reiðar at lofta tí.

**Niels Winther**, stjóri í Vinnuhúsinum

---

Tað er trupult at ímynda sær týdningin av einari virknari og ábyrgdarfullari vinnu, sum setir greið mál fyri eitt betri umhvørvi. ESG frásagnir vísa á umráðandi framstig innan burðardygd, sum ikki síggjast í vanliga bókhaldinum, men sum hevur vaksandi týdning, bæði fyri føroyskar og altjóða kundar. Eg vóni tí, at Burðardygt Vinnulív hevur traðkað eina slóð, sum fleiri smá og stór feløg fara at fylgja.

**Magnus Rasmussen**, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

# 1. UM **LEIÐBEININGINA**



# 1. UM LEIÐBEININGINA

## 1. HVAT ER EIN ESG-FRÁSØGAN

ESG er ein stytting fyri „Environmental, Social og Governance“ ella á føroyskum, umhvørvi, sosial og leiðsla.

ESG avrikið hjá fyritøkum og stovnum er týðandi og hevur vaksandi áhuga fyri áhugabólkum, og í sambandi við, at fatanin av hesum økist, til ein víðari samanhang til tann fíggjarligan váðan, ið er knýttur at hesum. Tað er eftirfylgjandi ein vaksandi væntan um tann privata sektorin til at hækka støðið og betra gjøgnumskygni við at fráboða ESG-úrslit. Hesar sjálvbodnu leiðreglurnar eru fyri at styrkja føroyskum vinnulívi at taka tað fyrsta stigið til at innfría altjóða frásagnarvæntanir, serliga frá kapitalmarknað-inum og endaliga at betra um ESG-avrik og langtíðar-fíggjarlig-, umhvørvislig- og sosial avrik.

## 2. HVØNN ER LEIÐBEININGIN ÆTLAÐ TIL?

Hendan leiðbeiningin er ment til lítlar, miðal og stórar fyritøkur og stovnar, sum hava sítt virksemi í Føroyum. Ætlanin er at styrkja og hjálpa fyritøkum og stovnum, sum eru á byrjanarstigi, tá tað kemur til frásøgnina av tí sum er meira enn fíggjarlig frásøgn. Hetta er fyri at eyðmerkja, raðfesta, handfara og hava frásøgn um avrikið hjá felagnum viðvíkjandi ESG-váðum og møguleikum.
Hendan leiðbeiningin inniheldur leiðreglur um, hvussu ein ger eina frásøgn, eisini er ein listi yvir ESG-marktøl, sum ein sjálvboðin kann velja at lýsa, og sum hevur týdning fyri flestu, um ikki allar fyritøkur og stovnar, sum hava virksemi í Føroyum.
Feløg og stovnar kunnu nýta hesa leiðbeining til at gera eina burðardygga frásøgn við ESG- lyklamátum, sum kunnu nýtast sum samskiftistól við áhugabólkar.
Størri fyritøkur og stovnar kunnu nýta ymsar samskiftishættir til ESG-data. Smærri fyritøkur og stovnar kunnu velja at avmarka samskifti av ESG-frásøgnini í fíggjarliga roknskapinum.

## 3. HVÍ FRÁBOÐA UM ESG-MÁL

Týdningurin av ESG-frásagnum er størri enn nakrantíð áður. Eisini hóast ESG-lyklatøl enn eru sjálvboðin fyri virksemi í Føroyum, so fær tann, ið leggur seg á odda í hesum, størri fyrimunir við at gera hetta, og samtíðis verður betur útgjørdur fyri møguliga framtíðar lóggávu á økinum.

- **Langtíðarburðardygd.** At skilja og reagera strategiskt á týðandi ESG-málum fer at økja um mótstøðuføri mótvegis møguligum váðum, og eisini at eyðmerkja og vinna fyrimunir í teimum møguleikunum, ið eru, við at umleggja til ein lág- útláts umferðarbúskap.

- **Betri eyðmerking av váða og váðaminking**. At greina hvørji øki hava størri týdning fyri felagið kann betra um tilgongdina til váða generelt, ella í øðrum lagi sameina nýggjar váðar, sum alifrøðiligar og umskifti til veðurlagsbroytingar viðføra, til ein part av váðastýringini hjá fyritøkum og stovnum.

- **Økt virkisføri og virkisavrik.** At lýsa mátingina av ESG-lyklatølum fer at betra um innanhýsis fráboðanarskipanir og økja um tilvitið hjá leiðsluni. Í fleiri førum hjálpir hetta fyritøkum og stovnum at eyðmerkja møguleikar fyri øktan effektivitet, sum viðførir fíggjarliga sparing í framtíðini.

- **Øktur áhugi.** Samskiftið við áhugabólkar gjøgnum ESG-frásagnir kann geva størri vitan, fatan og eitt lyfti fyri langtíðarhugsan innanfyri fyritøkuna/stovnin, saman við summun uttanhýsis áhugabólkum.

- **Kappingarsemi.** Føroyar eru í høvuðsheitum ein útflutningsbúskapur, tískil er tað í áhuganum hjá Føroyum ikki at vera aftanfyri slóðbrótarar innan ta altjóða vinnuna og harvið ikki verða kapping-arfør. Altjóða kapitalmarknaðir høvdu somu-leiðis kunna veitt ein lægri kostnað av kapitali, tá tað er møguligt at vísa á ein lægri váða í síni fyritøku. Smærri fyritøkur og fyritøkur, ið veita tænastur til heimamarknaðin, kunnu eisini fáa fyrimunir frá kappingarliga gagninum, sum framkemur við at samskifta um tey avrik, ið koma frá ESG-frásøgnini.

- **Menning av dátuvitan.** At samla og nýta ESG-dátur kann betra um støðutakan, vaksa um tað ó-ítøkiliga, bæði á einum vinnuligum og einum tjóðarligum stigi í Føroyum.

## 4. SAMEINING VIÐ ALTJÓÐA MEGINREGLUR

Á altjóða støði eru fyritøkur og stovnar í einari skjótari broyting viðvíkjandi frásagnarhættum. Týðandi kunngerðir frá Evropiska Samveldinum, har kunngerðin frá 2019, sum ber heitið „European Green Deal", byrjaði ein vøkstur við ásetingum á frásagnarstøði, sum ES Taxonomy og Virkisburðadygdarfrásagnir (CSRD), sum upprunaliga høvdu stór feløg á keypsskála sum málbólk. Hendan leiðbeiningin fyrireikar tó ikki fyritøkur og stovnar at fráboða samsvarandi hesum, men við at fylgja hesum og fráboða ESG-lyklatøl, gevur leiðbeiningin fyritøkum og stovnum ein fyrimun, um tey verða biðin um at lata vitan til virðisketupartarnar, ið eru áløgd til at fráboða til veitarar og undirveitarar.

Hendan leiðbeiningin er eftir tilvísing til „Euronext ESG Reporting guide: Target 1.5 degrees celcius" og „Global Reporting Initiative Standards". Tað verður mælt til at vísa til GRI standardar, serliga fyri at skilja tey tilhoyrandi lyklatølini, sum seinni eru umrødd í hesari leiðbeining.

Virkir kunnu eisini vísa til nógv nýttu leiðbeiningarnar nevndar niðanfyri, sum eru altjóða standardar, rammir og meginreglur.

- „Global Reporting Initiative" (GRI) er ein óheftur altjóða felagsskapur, sum hjálpir fyritøkum og øðrum felagsskapum at taka ábyrgd av teirra ávirkan við at bjóða feløgum eitt altjóða mál at samskifta við. Felagsskapurin bjóðar mest brúkta altjóðastandardin fyri burðardyggar frásøgur, GRI standardin.

- „United Nations Sustainable Development Goals" (SDG) er ein felagsskapur við 17 heimsmálum, sum skulu náa 2030 málsetningin fyri burðardyggari menning. Tey umboða tær tríggjar dimensjónirnar til burðardygga menning, ið er búskaparlig, sosial og umhvørvislig menning. Málini eru brotin niður í mál og lyklatøl. Hagstova Føroya hevur eina verkætlan við at menna frásagnarstigið av lyklatølum fyri Føroyar.

- Vakstrarhúsútlátsprotokollin bjóðar roknskap-arhættir og frásagnarstandardar til at máta og stýra vakstrarhúsútláti (GHG) frá tí privatu og tí almennu virðisketunum, vørum, býum og politikki. GHG er vanliga deild upp í vavi 1, 2 og 3 alt eftir, hvat fyri útlat, tað er. Tað er tað mest vanliga amboðið til at fylgja við vakstrarhúsútlátinum.

- „Science-Based Targets initiative" (SBTi) er ein verkætlan, sum hjálpir fyritøkum og stovnum at seta mál fyri lækkingar av vakstrarhúsútlati, sum er í tráð við vísindarlig tilmæli. Málið er at mæla til strategi'ir, ið eru samansjóðað við altjóða mál um at minka um útlátið, ið krevst fyri at steðga altjóða upphitingini samsvarandi tilmæli frá IPCC og París veðurlagssáttmálanum.

- TCFD er ein vinnustýrdur felagsskapur, ið er settur saman av G20 nevndini fyri fíggjarligt støðufesti. (FSB). Hendan hjálpir íleggjarum at skilja teirra fíggjarliga váða til umhvørvisárin, og arbeiðir við fyritøkum at fráboða teirra upplýsingar á ein týðiligan og reglufastan hátt.

- TNFD er ein vinnustýrdur bólkur, sum mennir og útvegar eina váðastýring og kunngerðarrammu fyri felagsskapir, og at hava frásøgn um at seta í verk broytingar á umhvørvisligar váðar.

- „Future-Fit Foundation" stovnurin er ein vælgerðarstovnur, sum hevur framleitt eitt markvirði til at vegleiða fyritøkur í at máta og hava frásagnir samanhildnar við ásetingarnar hjá UN SDG. Hetta kann nýtast sum eitt nýtuligt tól fyri lítlar, miðal og stórar fyritøkur, sum vilja taka stigið fyri einari skipaðari tilgongd til teirra ESG-strategi og frásøgn.

Felagsskapir kunnu eisini vísa á nýggjar broytingar á frásagnaráseting-um, herí vinnuliga burðardygds frásagnarleiðbeining frá 2021 CSRD; Burðardygdar og fíggjarliga kunngerðarásetingin frá 2019 SFDR og ES taxonomy fyri burðardygt virksemi. Tann næsti parturin av hesari leiðbeining fer at fevna um fleiri viðmæli við hesum ásetingunum í huga.

# 2.
# HVUSSU VERÐUR EIN EIN **ESG-FRÁSØGN** FYRIREIKA



## 1. MET UM ØKI, IÐ ERU TÝÐANDI

Tað eru nógvar ymiskar positivar og negativar ávirkanir, ein fyritøka kann hava á samfelagið sum ein avleiðing av teirra virksemi. Hesar kunnu verða og eru ofta bundnar saman innanhýsis og kunnu elva til býtishandlar. Her verður hugsað um vavið, ið virksemið hevur á búskapin, umhvørvið og menniskju, og sum fyritøkan hevur tamarhald á. Tað er týdningarmikið at hugsa um og skilja uttanhýsis faktorar og treytir, ið hava ávirkan á fyritøkuna t.d. veðurlagsbroytingar. At skilja, stýra og planleggja við hesum í huga, kann gera tað møguligt fyri eina fyritøku at skapa burðardygg virðir í framtíðini.

Fyri at fyrireika eina ESG -frásøgn skal ein fyritøka raðfesta avbjóðingar, ið umboða tær mest týðandi ávirkanirnar. Tað er tí neyðugt at byrja við at útarbeiða eina greining, fyri at sanna hvørjar hesar eru, soleiðis at fyritøkan hereftir kann skerja ella økja strategiskt við hesum í huga.

Starvsfólk í eini fyritøku kunnu byrja við gransking og finna fram ein lista yvir ESG avbjóðingar, ið verða leitaðir fram á ymsum keldum so sum altjóða rammuverki ella leiðbeiningum, ESG indikatorum o.s.fr. Dømir fyri týðandi avbjóðingar kunnu verða veðurlagsbroytingar, heilsa og trygdleiki á arbeiðisplássinum ella fjølbroytni í nevndini.

Fyri at fáa íkast til listan kann fyritøkan eyðmerkja, bjóða til kjak við innanhýsis-, uttanhýsis áhugapørtum og serfrøðingum við einum áhuga í virkseminum hjá fyritøkuni at skilja teirra væntanir av fyritøkuni. Hesi kunnu umfata starvsfólkini, fakfeløg, eigarar, íleggjarar, myndugleikar, kundar, útvegarar, NGO'arar og lokalsamfelagið ella umboðsmenn í áhugabólkum. Tað er týdningarmikið at meta um hesir áhugapartar hava nøktandi vitan, áðrenn tey seta seg inn í málið, soleiðis at tey kunnu skapa grundarlag fyri metingunum av ávirkanunum.

Raðfestingar skulu síðani gerast við íkasti frá áhuga-bólkum og serfrøðingum, og eini innanhýsis meting av teirra týdningi, sum kann verða gjørd saman við leiðsluni. Ein eigur at meta um týdningin fyri áhugabólkar, og eisini týdningin fyri búskaparlig, sosial og umhvørvislig árin, ið viðføra, at fyritøkan framhaldandi skapar burðardygg virðir, eisini langtíðarvirðir. Hetta kann verða sett í eina talvu og eigur at vísa ein lista av avbjóðingum, ið verður prioriteraður av fyritøkuni. Hetta er ein avbjóðandi uppgáva.

## 2. MENNA EINA STRATEGI

Fyritøka eigur eftirfylgjandi at menna eina ætlan fyri at minka um hesar váðar og gagnnýta møguleikar, antin við at skerja ella økja um møguliga ávirkan.

Ein góður spurningur at byrja við er: Á hvørjum stigi ávirka hesir trupulleikar mína fyritøku og hennara evni til at skapa burðardygg virðir í framtíðini?

Niðurstøðan kann verða, at neyðugt er at endurnýggja modellið ella strategiina hjá fyritøkuni ella at sameina týðandi váðar og møguleikar saman við tí dagligu stýringini hjá fyritøkuni. At seta langtíðarmál og allýsa stuttíðarmál fyri at stuðla undir teimum, tá hetta er gjørligt, í samsvari við tjóðskaparligar ella atljóða væntanir, er ein týdningarmikil partur av gongdini. Hetta krevur, at ein eyðmerkir týðandi lyklatøl fyri at máta og sýna úrslitini hjá fyritøkuni.

## 3. FYRIREIKA EINA ESG-FRÁSØGN

Tá ein frásøgn verður fyrireikað, er tað týdningarmikið, at hendan verður framleidd á einum hóskandi strukturi, sum inniheldur allar neyðugar lutir fyri lesaran, ið kann skilja bæði tilgongdina og møguleikan til at nýta ESG-frásøgnina, og gongdina yvir frásagnartíðarskeiðið. Frásøgnin eigur at innihalda neyðugar ábendingar, ið verða vístar í náttúrligum samanhangum og ígjøgnum tær best egnaðu samskiftisrásirnar.

### BYGNAÐUR

Ein ESG-frásøgn kann umfata:

- Úrslitini frá eini greining, ið inniheldur eina yvirskipaða frágreiðing av týðandi avbjóðingum og evnum.
- Eina ESG- ella burðardygga ætlan, ið tekur grundstøðið frá vísindaligum tilmælum, og er stuðlað undir við meðal- og langtíðarmálum.
- Eina ætlan og lýsing av politikkum fyri at stuðla hennara verkseting.
- Eina frágreiðing um árligu úrslitini, við hjálp frá viðkomandi lyklatølum fyri at vísa framgongdina við strategiini (og øðrum viðkomandi evnum við týdningi fyri áhugapartar)

Størri fyritøkur kunnu eisini lata upplýsingar um:

- Eina váðagreining
- Eitt veðurlags framlit í samsvari við viðmælum frá TCFD
- Eina frásøgn av avrikinum samsvarandi ES taxonomy

## LYKLATØL

Hendan leiðbeiningin inniheldur ein lista av vanliga nýttum ESG-lyklatølum fyri vanlig aðalmál hjá fyritøkum, ið hava frásagnir um síni avrik. Við einstøkum undantøkum er meirilutin av ESG-lyklatølunum sæð sum týðandi mál fyri flestu, um ikki allar, fyritøkur. Tó skal vísast á, at í einstøkum førum er virksemið hjá fyritøkuni soleiðis hátta, at einstøk lyklatøl verða mett at verða ótýðandi. Við at gera eina greining av týðandi økjum, sum nevnt í pkt. 2.1, kann ein fyritøka velja at vísa á fleiri lyklatøl, sum t.d. javnbjóðis løn millum kyn ella onnur serstøk lyklatøl. Leiðbeiningar í GRI, almennar ella aðrar leiðbeiningar kunnu vera nýtuligar her.

## SAMANHANGUR

Tað er umráðandi at vísa ESG-lyklatøl í einum samanhangi, so at tað er nýtiligt fyri lesarar og greinarar, tá teir lesa frásøgnina fyri seg. Ein lesari eigur lættliga at kunna samanbera við dátum frá øðrum frásagnum.

Frásøgnin skal lýsa dáturnar soleiðis, at vitanin kann setast í samanhang millum frásøgnina og málsetningin, um at økja um vinning, íløgur og fígging.

## HVAR SKAL ESG-FRÁSØGNIN

Uttan so, at tú ert bundin at frásagnarkrøvum, sum krevja annað, skal ESG-frásøgnin verða útgivin sum ein frásøgn fyri seg, ella ein partur av einari fíggjarligari ársfrásøgn. Hendan kann eisini útgevast á alnótini. Frásøgnin skal ikki avmarka samskiftið við áhugapartar, til dømis íleggjarar og fíggjarar, men heldur eggja til meira samskifti.

## FRÁSAGNARMEGINREGLUR

Ein ESG-frásøgn skal fylgja frásagnarmeginreglunum, sum eru lýstar í GRI 1, sum inniheldur: Neyvleika; javnvág; greiðleika; samanberingar; tíðarhóskandi og kunnu sannast.
ESG-upplýsingar eiga at vera eins álítandi sum fíggjarligir upplýsingar. Sum ískoyti til meginreglurnar omanfyri, verður viðmælt, at feløg fylgja grundleggjandi meginreglum í ESG-frásagnum, sum eru:

- **Frásagnarmørk.** Brúka tey somu frásagnarmørkini sum í ársfrásøgnini.
- **Konsolidering**. Brúka somu meginreglur sum ársfrásøgnin í mun til konsolidering av upplýsing-um.
- **Tíðarskeið.** Hava sama tíðarskeið til ESG-frásøgnina sum fíggjarliga ársfrásøgnin hevur.
- **Nýttur roknskaparháttur.** Vís á hvørjar hættir eru nýttir fyri at rokna ESG-dáturnar undir nýttum roknskaparhátti í ársfrásøgnini ella í einari serskildari notu.
- **Avrik og kós.** Vís týðiliga á søguligu gongdina fyri 3-5 ár.

## DØMIR TIL ESG-FRÁSAGNIR

Dømi (úr Føroyum) av frásagnum, sum eru gjørdar í samsvari við GRI:
Bakkafrost Healty Living Report 2021.

Dømi (úr Føroyum) av frásagnum, sum nýta nøkur ESG-lyklatøl:
Føroya Tele og onnur eru eisini.

Dømi (úr Danmark) av einari frásøgn, sum er í samsvari við fleiri av teimum bestu mannagongdum, rammum, standardum og framtakssemi:
Ørsted ESG performance report 2021
Ørsted Sustainability report 2021

# 3.
# UPPSKOTIN **LYKLATØL**



# 3. UPPSKOTIN LYKLATØL

### 3.1 ERU ØLL LYKLATØLINI VIÐKOMANDI FYRI MEG?

ESG lyklatølini, ið eru viðmæld í hesari leiðbeining, eru ikki viðkomandi fyri allar fyritøkur. Tó vilja flestu lyklatølini, vera viðkomandi, fyri at fremja greiningar og samanberingar millum fyritøkur og vinnugreinar. Lyklatølini skulu brúkast saman við øðrum lyklatølum, sum fyritøkan ella vinnugreinin er partur av.

### 3.2 HVUSSU ERU JÚST HESI LYKLATØLINI VALD

Tað er eingin føroysk lóggáva, sum krevur tey lyklatøl, ið eru viðmæld í hesi leiðbeining. Lyklatølini eru vald úr keldum fyri 2019 í Finansforeningen: ESG-lyklatøl í ársfrásøgnini, GRI og aðrar frásagnar standardar, sum ikki eru nevndar í hesi frágreiðing. Tað eru summar fyritøkur í Føroyum, sum hava verið eftirspurdar viðvíkjandi hesum lyklatølum.



# **3.** UPPSKOTIN **LYKLATØL**

| **3.3 UPPSKOTIN LYKLATØL** | Eind | Mál | **2021** | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **UMHVØRVISLIGT** | | | | | | | |
| $CO_2$e Vavi 1 | t | 1.000 | **1.000** | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| $CO_2$e Vavi 2 | t | 1.000 | **1.000** | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Orkunýtsla | GJ | 1.000 | **1.000** | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Parturin av varandi orkukeldum | % | 100 | **100** | 100 | 100 | 100 | 100 |
| Úttøming av vatni | Ml | 100 | **100** | 100 | 100 | 100 | 100 |
| Burturkast frá rakstri | t | 1.000 | **1.000** | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Burturkast til endurvinning | t | 100 | **100** | 100 | 100 | 100 | 100 |
| Burturbeint burturkast | t | 1.000 | **1.000** | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Rakstarstøð við høgum lívfrøðiligum margfeldi | Fleiri | 1.000 | **1.000** | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Týðandi ávirkan á lívfrøðiligt margfeldi | Serstakt | 1.000 | **1.000** | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| **SOSIALT** | | | | | | | |
| Fulltíðar starvsfólk | FTE | 1.000 | **1.000** | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Varandi | Tal | 1.000 | **1.000** | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Fyribils | | | | | | | |
| Ikki tryggjað arbeiði | Tal | 1.000 | **1.000** | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Fulltíðar | Tal | 1.000 | **1.000** | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Parttíðar | Tal | 1.000 | **1.000** | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Kvennkyn | % | 50 | **50** | 50 | 50 | 50 | 50 |
| Aldur | Í miðal | 1.000 | **1.000** | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Annað | Sjálvboðið | 1.000 | **1.000** | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Kynsmargfeldi í leiðslu (Kvennkyn) | % | 1.000 | **1.000** | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Broyting í starvsfólkahópi | % | 1.000 | **1.000** | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Sjúkradagar | Dagar/FTE | 1.000 | **1.000** | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Varðveitsla av kundum | % ella tal | 1.000 | **1.000** | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| **LEIÐSLA** | | | | | | | |
| Kynsmargfeldi í nevnd (Kvennkyn) | % | 50 | **50** | 50 | 50 | 50 | 50 |
| Uppmøting til nevndarfundir | % | 50 | **50** | 50 | 50 | 50 | 50 |
| Tjóðskapur hjá nevnd (Útlendsk) | % | 50 | **15** | 15 | 15 | 15 | 15 |

## 3.4 SAMANHANGUR, FRÁGREIÐING OG FRYMLAR

### $CO_2$E VAVI 1

**Samanhangur og eyðmerking**

Beinleiðis útlát frá forbrenningini av brennievnum og tilfari. Sum oftast er $CO_2$e ikki mált, men útroknað, hetta er grundað á mát frá brúktum tilfari, t.e. olju, gas, diesel, bensin og øðrum. Mongdin av brendum brennievni/tilfari er faldað við umformarum fyri útlát av teimum 7 kyoto gassunum: ($CO_2$e), ($CH_4$), ($N_2O$), (HFC), (PFC), ($SF_2$) og ($NF_3$). Hesi vakstrarhúsgassir hava ymiska ávirkan á altjóða upphitingina og verða tí skil normaliserað til $CO_2$ líknandi útlát ($CO_2$e), við at falda hetta við teirra individuella GWP faktor.

Í framtíðini verður møguligt at brúka hesar dátur sum samanberingar-grundarlag við Hagstovu Føroya.

**Frymil**

Vakstrarhúsgassútlát eru útroknað fyri hvørt brent tilfar, t.d. $CH_4$ = (slagið av tilfarinum, sum er brent (t)*tað er samsvarandi virðinum við $CO_2$ fyri tilfarið). Eind: Tons.

Tá øll útlát eru útroknað, verða tey samanløgd til tons av samsvarandi $CO_2$ (t $CO_2$e).

**Tilvísing:** GRI 305: Útlát 2016

### $CO_2$E VAVI 2

**Samanhangur og eyðmerking**

Óbeinleiðis útlat frá orku til at framleiða ravmagn, fjarhita ella fjarkulda, sum felagið hevur keypt til sína nýtslu. Vavi 2 útlát eru eftir einari meginreglu útroknað á sama hátt sum Vavi 1 útlát, tó vanliga verða ikki øll Kyoto gass tikin við. Fyrivarni skal takast fyri nýtslu av ravmagni, fjarhita og fjarkulda, sum má vera innsavnað fyri hvørt landi sær (um fyritøkan hevur virksemi uttanfyri Føroyar), tí at tað eru týðandi frávik í útlátinum av $CO_2$e millum lond, og tí skil er umrokningarfaktorur útroknaður fyri hvørt landi sær.

Fyri fyritøkur, sum hava virksemi uttanfyri Føroyar, er tað vert at umhugsa at keypa orku frá varandi orkukeldum (vind-, sólar, jarðhitarorku o.s.v.), tí meginreglan er, at tað er einki útlát frá hesum orkukeldum.

Tí burdi hetta ikki havt ávirkan á Vavi 2, men skal vera tikið við í nýtsluna av orku. Um fyritøkan selur ravmagn, skal hetta ikki verða frádrigið frá keyptum ravmagni, men skal verða fráboðað sum ískoyti. Í Føroyum verður ravmagn veitt av Elfelagnum SEV, so tann sami samsvarings-faktorurin (samsvarandi býti av varandi orkukeldum fyri frásagnarárið) verður nýttur til allar fyritøkur, ið keypa ravmagn frá Elfelagnum SEV.

Í framtíðini verður møguligt at brúka hesar dátur sum samanberingar-grundarlag við Hagstovu Føroya.

**Frymil**

Vavi 2 útlát verður útroknað fyri hvørt land per keypt MWh av ravmagni, og/ella av fjarhita/kulda – T.d. $CH_4$= (keypt MWh ella GJ*$CH_4$ faktorin fyri umskapan fyri hvørt land). Tá øll útlát eru útroknað, eru tey normaliserað til $CO_2$e. Eind: tons

**Tilvísing:** GRI 305: Útlát 2016

### ORKUNÝTSLA

**Samanhangur og eyðmerking**

Ein felagsskapur kann brúka orku í fleiri ymiskum formum, sum t.d. brennievni, ravmagn, hita o.s.v. At brúka orku meira gagnligt og at brúka eina blanding av varandi orkukeldum er týðandi fyri stríðið ímóti veðurlags-broytingum og fyri at minka um kolevnisslóðina hjá felagsskapinum.

Orka er, sum útlát, vanliga útroknað á brúkið faldað við samsvarandi virðinum. Brúkta orkan skal verða tikin frá bæði Vavi 1 og 2 keldum, men má eisini hava orkuna frá varandi orkukeldum.

Í framtíðini verður møguligt at brúka hesar dátur sum samanberingar-grundarlag við Hagstovu Føroya.

**Frymil**

Orkunýtslan = (slagið av brendum brennievni (t) * Orkufaktorurin fyri slagnum av brennievni) + (Brúkt ravmagn(herav varandi orkukeldum) (MWh)*3,6) + (Brúktur fjarhiti/kuldi við varandi orkukeldum(GJ)). Eind: GJ.

**Tilvísing:** GRI 302: Orka 2016

# **3.** UPPSKOTIN **LYKLATØL**

## PARTUR AV VARANDI ORKUKELDUM

**Samanhangur og eyðmerking**

Hetta lyklatalið vísir, hvussu stórur partur av orkuni, sum verður brúktur, er frá varandi orkukeldum. Hetta kann eisini verða mátað sum varandi orka ímóti ikki varandi orku, men so vil ávirkanin vera ómøgulig at máta fyri tær fyritøkur, ið einans hava varandi orku. Í Føroyum ger Elfelagið SEV eina uppgerð av, hvussu býtið av varandi orku er.

**Frymil**

Varandi orkubýtið = (Varandi orka/øll orka) * 100. Eind: %.

**Tilvísing:** GRI 302: Orka 2016

## ÚTTØMING AV VATNI

**Samanhangur og eyðmerking**

Málini fyri burðardyggari menning, samtykt av ST sum ein partur av 2030 dagskránni fyri burðardyggari menning, hevur nøkur høvuðsmál við, herí hvussu vatn verður handfarið undir mál 6: Tryggjað tøkt vatn og burðardygga handfaring av vatni og reinleika fyri øll. Meginreglan við hesum er, at øll skulu hava atgongd til trygt og bíligt vatn, at betra góðskuna av vatni og nýta vatn skynsamt. Virksemið hja einum felagsskapi kann ávirka hetta á nógvar mátar.

**Frymil**

Alt vatnið, sum verður tømt út til øll økir, verður mált í mega litrum við einari greining av, hvar vatnið er tømt út.
Eind: Ml

**Tilvísing:** GRI 303: Vatn og frárensl 2018

## BURTURKAST FRÁ RAKSTRI

**Samanhangur og eyðmerking**

Burturkast, sum er av rakstrinum hjá fyritøkuni, t.d. av framleiðsluni av vørum. Burturkast kann hava týðandi negativa ávirkan á umhvørvið og vælveruna hjá menniskjum, tá tað ikki er rætt handfarið. Óneyðugt burturkast kann verða sæð sum eitt slag av fíggjarligum spilli.

**Frymil**

Øll vektin av burturkasti, sum er burturbeint í tonsum, er greinað í bólkar, og hvussu tað verður burturbeint.
Eind: Tons.

**Tilvísing:** GRI 306: Burturkast 2020

## BURTURKAST TIL ENDURVINNING

**Samanhangur og eyðmerking**

Sum áður nevnt fyri burturkast, í brotinum omanfyri.

**Frymil**

Øll vektin av burturkasti, sum er burturbeint í tonsum, er greinað í bólkar, og hvussu hetta verður burturbeint.
Eind: Tons

**Tilvísing:** GRI 306: Burturkast 2020

## BURTURBEINT BURTURKAST

**Samanhangur og eyðmerking**

Sum áður nevnt fyri burturkast, í brotinum áðrenn.

**Frymil**

Øll vektin av burturkasti, sum er burturbeint í tonsum, er greinað í bólkar, og hvussu tað verður burturbeint.
Eind: Tons

**Tilvísing:** GRI 306: Burturkast 2020

## RAKSTRARSTØÐ VIÐ HØGUM LÍVFRØÐILIGUM MARGFELDI

**Samanhangur og eyðmerking**

Ávirkan frá virksemi, vørum og tænastum til lívfrøðiligt margfeldi, vil vera ymiskt frá felag til felag, grundað á ymiskar faktorar. Tað er viðmælt, at felagsskapir eyðmerkja teirra høvuðsávirkan á náttúruna, við at brúka leiðreglur sum SBTN leiðreglan, fyri at hava møguleikan at eftirkanna hesar ávirkanir og hava frásagnir um tær.

**Frymil:** N/A

**Tilvísing:** GRI 304: Lívfrøðiligt margfeldni 2016

## TÝÐANDI ÁVIRKAN ÁLÍVFRØÐILIGT MARGFELDI

**Samanhangur og eyðmerking**

Ávirkan frá virksemi, vørum og tænastum til lívfrøðiligt margfeldi, vil vera ymiskt frá felag til felag, grundað á ymiskar faktorar. Tað er viðmælt, at felagsskapir skulu eyðmerkja teirra høvuðsávirkan á náttúruna, við at brúka leiðreglur sum SBTN leiðreglan, fyri at hava møguleikan at eftirkanna hesar ávirkanir og hava frásagnir um tær.

**Frymil:** N/A

**Tilvísing:** GRI 304: Lívfrøðiligt margfeldni 2016

# 3. UPPSKOTIN LYKLATØL

## FULLTÍÐAR STARVSFÓLK

**Samanhangur og eyðmerking**

Til at máta fulltíðar starvsfólk er neyðugt at taka við beinleiðis fulltíðar starvsfólk og fyribilssett starvsfólk. Harumframt krevur ársroknskaparlógin fyri størri feløg, at ársverk verða upplýst. Til hetta krevst ein útrokning fyri fulltíðar starvsfólk í meðal (ársverk), (hetta merkir fulltíðar starvsfólk + lønt yvirtíð + ársverk- útroknað tímalønt starvsfólk + ársverk útroknað fyribils starvsfólk).

Í framtíðini verður møguligt at brúka hesar dátur sum samanberingar grundarlag við Hagstovu Føroya.

**Frymil**

Fulltíðar starvsfólk = Ársverk + fyribils starvsfólk.
Eind: Fulltíðar starvsfólk.

**Tilvísing:** ÁRL, GRI 2 Aðal kunngerðir 2021

## STARVSFÓLK

**Samanhangur og eyðmerking**

Hetta sundurbýtið gevur innlit í hugsjónina hjá fyritøkum viðvíkjandi starvssetanum.

**Frymil**

Fyritøkan fer at hava lyklatøl um øll starvsfólk, fulltíðar, fyribils, ikki tryggjaðir tímar, fulla tíð og parttíð og eina sundurgreining av hesum í mun til kyn og øki.

**Tilvísing:** ÁRL, GRI 2 Aðal kunngerðir 2021

## MARGFELDI

**Samanhangur og eyðmerking**

At tryggja at margfeldi og javnstøða á arbeiðsplássinum kann hava felags fyrimunir, tí at javnstøða kann viðføra fíggjarliga menning.

Í framtíðini verður møguligt at brúka hesar dátur sum samanberingargrundarlag við Hagstovu Føroya.

**Frymil**

Kynsmargfeldi = ((Ársverk hjá kvinnum + fyribils kvinnu starvsfólk)/(Fulltíðar starvsfólk)) * 100.
Miðal aldur: (Aldur tilsamans)/(Ársverk).
Annað: Brúk fyri nágreining

**Tilvísing:** GRI 405 Margfeldni og javnstøða 2016

## BROYTING Í STARVSFÓLKAHÓPI

**Samanhangur og eyðmerking**

Broyting í starvsfólkahópi verður útroknað við bæði sjálvráddari fráfaring og ikki sjálvráddari fráfaring. Fráfaring vegna aldur verður í hesum førum sæð sum ikki sjálvrádd fráfaring. Gevið gætur, hetta er einans útroknað fyri egið ársverk.

**Frymil**

Broyting í starvsfólkahópi = ((Sjálvrádd + ikki sjálvrædd fráfaring)/Ársverk).
Eind: %

**Tilvísing:** GRI 401: Starvsseting 2016

## SJÚKRADAGAR

**Samanhangur og eyðmerking**

Talið av øllum arbeiðsdøgum, har starvsfólk eru sjúk og ikki til arbeiðis, í mun til talið av ársverkum. Barsil er ikki íroknað.

**Frymil**

Sjúkradagar = (Talið av sjúkradøgum fyri øll ársverk fyri tíðarskeiðið)/(Ársverk)
Eind: %

**Tilvísing:** OECD Heilsuhagtøl 2020, greining, keldur og mannagongdir.

## VARÐVEITSLA AV KUNDUM ELLA NETTOFREMJANDI KUNDASTIG

**Samanhangur og eyðmerking**

Varðveitsla av kundum vísir, hvussu stóran part av kundunum eru varðveittir frá einum tíðarskeiði til eitt annað. Gevið gætur, hetta lutfallið er bara brúkbart fyri fyritøkur við afturkomandi kundum og einari stuttari keypsringrás.

Nettofremjandi kundastig (NPS) er møguliga meira týðandi fyri fyritøkur, sum ikki máta, hvussu nógvir kundar koma aftur. NPS mátar, hvussu trúgvir kundarnir eru fyri fyritøkuna.

**Frymil** – Kundavarðveitsla

Kundavarðveitslustig: (Talið av kundum í endanum av einum tíðarskeiði)- (Talið av nýggjum kundum í sama tíðarskeiði)/(Talið av kundum í byrjanini av sama tíðarskeiði) * 100.
Eind: %

**Tilvísing:** Farris et al (2017) Key marketing Metrics – The 50+ metrics every manager should know, Pearson Education Ltd, Harlow, UK.

**Frymil** – Nettofremjandi kundastig (NPS)

NPS er mált við einari spurnarkanning við einum spurningi og frágreitt við einum tali frá -100 til +100, har eitt hægri virði er best.

**Tilvísing:** Qualtrics

# **3.** UPPSKOTIN **LYKLATØL**

## KYNSMARGFELDI Í NEVND

**Samanhangur og eyðmerking**

Tá ein fyritøka eggjar regluliga við javnstøðu og margfeldi til arbeiðis, kann tað skapa fyrimunir fyri fyritøkuna og samfelagið sum heild, tí javnstøða fremur búskaparligan vøkstur. Kynsmargfeldið fyri nevndarvaldar sessir á aðalfundinum roknað eftir endanum av roknskap-arárinum. Gevið gætur, at fyri fyritøkur, sum skulu hava frásagnir til Fíggjareftirlitið, verður margfeldið útroknað fyri alla nevndina, við starvsfólkavaldum umboðum, men undantikið politiskt valdar limir.

Í framtíðini verður møguligt at brúka hesar dátur sum samanberingargrundarlag við Hagstovu Føroya.

**Frymil**

Kynsmargfeldi, nevnd = ((Aðalfundarvald kvennkyn í nevnd)/(Allir aðalfundarvaldir nevndarlimir)) * 100.
Eind: %

**Tilvísing:** GRI 405 Kynsmargfeldið og javnur møguleiki 2016. Danskar tilmælingar fyri vinnuliga leiðslu (2020).

## UPPMØTING TIL NEVNDARFUNDIR

**Samanhangur og eyðmerking**

Mátar virksemið hjá nevndarlimum.

**Frymil**

Uppmøting til nevndarfundir = ((Talið av nevndarfundum fyri hvønn nevndarlim)/(Talið av nevndarfundum * Talið av nevndarlimum)) * 100.
Eind: %

**Tilvísing:** Danskar tilmælingar fyri vinnuliga leiðslu (2020).

## TJÓÐSKAPUR HJÁ NEVND

**Samanhangur og eyðmerking**

At máta hvussu stórur partur av nevndini er útlendsk. Ein útlendingur, í hesum dømi, eru tey, sum ikki hava føroyskt sum høvuðsmál. Lyklatalið er ein indikator, ið vísir, um felagið hevur sum mál at kappast altjóða og fyri at menna avrikar mátingarevnið.

**Frymil**

Tjóðskapur hjá leiðslu = (Talið av útlendskum nevndarlimum)/(Talið av nevndarlimum tilsamans) * 100.
Eind: %

**Tilvísing:** GRI 2 Aðal kunngerðir 2021

## GRANNSKOÐAN OG VISSA

Grannskoðarans frásøgn økir um trúvirði og eggjar álit fyri lesaran. Vissan av ESG-dátum fer at verða kravd fyri serstakar fyritøkur í ymiskum marknaðum. Tann álítandi ESG-frásøgnin kann hava eina váttan við vissu á ymiskum støði. Ein fyritøka kann spyrja ein óheftan part um at grannskoða, eins og við einari fíggjarligari ársfrásøgn.

Frásøgnin hjá grannskoðaranum kann vera við ella uttan vissu. Ein grannskoðanarfrásøgn uttan vissu er vanliga ein frásøgn, har grannskoðarin hevur hjálpt til við at klárgera ein part ella alla ársfrásøgnina. Slík frásøgn er ikki uttan týdning viðvíkjandi rættleikanum av ESG-dátunum. Leggjast skal aftrat, at grannskoðanarfrásøgnin kann fáast við avmarkaðari vissu ella høgari vissu, við standardum, sum eru í hesum øki.

Eitt krav fyri at vátta ESG-dátur er, at felagið hevur, ella fær, kontroll av innanhýsis mannagongdum fyri at savna, kanna og skjalfesta undirliggjandi útsagnir viðvíkjandi lyklatølum. Hetta krevur tillutan av tilfeingi til at byrja og viðlíkahalda, men gevur varandi avkast.
At hava ein serfrøðing í sambandi við fyrireikingar og vissu av ESG-frásøgnuni er viðmælt, serliga fyri tey, sum hava frásøgn fyri fyrstu ferð.

Hóast øll hóskandi stig eru tikin fyri at tryggja rættleikan av innihaldinum, so verður fyrivarni tikið fyri rættleikanum og fullfíggingini, í hesum sambandi verður ikki tikin ábyrgd fyri tapi ella skaða í nøkrum sambandi frá at brúka, hava álít á og at brúka vitanina frá hesari leiðbeining.

Hendan leiðbeiningin er bert ætlað sum kunning. Eingin vitan í hesari leiðbeining, sum er víst til ella lýst, skal vera sæð sum rættindi ella bindandi av nøkrum slagi.

Leiðbeiningin er einans galdandi við dags dato, 2022.